

www.oljan.fo

**Jan Müller** 11 - 06 - 2012

# Verkfall í norsku oljuvinnuni

Í nátt slitnaðu samráðingarnar millum arbeiðsgevararnar í norsku oljuvinnuni og tey, sum arbeiða hjá tænastufyritøkuni Baker Hughes. Tað bar í sær, at 114 starvsfólk á 12 ymsum oljupallum í Norðsjónum eru farin í verkfall. Avleiðingin kann verða, at pallar verða stongdir, og so fer verkfallið at kosta fleiri milliónir krónur um dagin, sigur NRK. Tey, sum eru farin í verkfall, eru limir í fakfelagnum SAFE. Arbeiðsgevararnir krevja, at tey skulu góðtaka ein standardsáttmála, sum mong hava, men Rolf Onarheim hjá SAFE sigur við norska kringvarpið, at standardsáttmálin er verri enn tann sáttmálin, sum starvsfólkini hava havt. Hann sigur, at tað er ikki bara ein spurningur um pengar, men eisini um verkfalsrætt, pensjónir og arbeiðstíð. Í fyrsta umfari avmarkar verkfallið borivirksemið, men sum frálíður fara fleiri pallar at liggja stillir, sigur Rolf Onarheim. Jan Hodneland, sum er stjóri í landsfelagnum hjá norska oljuídnaðinum, sigur við NRK, at arbeiðsósemjan er óheppin, men hann heldur, at krøvini hjá SAFE eru órímilig.